# Tórshavnar kommuna og vindorka

INGRID S. HENRIKSEN



**Mugu minka um nýtsluna av útlendskari, kostnaðarmiklari og umhvørvisdálkandi olju**

Tórshavnar kommuna, ið er fólkaríkasta kommuna í landinum, eigur at syrgja fyri at ganga undan, tá tað snýr seg um at avmarka nýtsluna av dálkandi olju og heldur framleiða elorku burturúr vindi.

Tórshavnar kommuna eigur at miðja ímóti skjótast gjørlig at útvega neyðuga politiska heimild at seta upp vindmyllur í hóskandi stað í kommununi at útvega borgarum sínum o. ø. umhvørvisvinarliga og reina orku – orku sum ikki er tengd at kostnaðarmiklari útlendskari, umhvørvisdálkandi olju. Kommunur eins og onnur í samfelagnum hava skyldu at royna at verja okkara felags luftumhvørvi, so eisini okkara eftirkomarar kunnu njóta eina góða og reina luft.

Sum er verða bert 5,9% ella 15,8 MWh av elorkuni hjá SEV framleidd við vindravmagns-útbúnaði/vindmyllum - í Neshaga í Eysturoynni og hjá SP/f Røkt í Vestmanna (Kelda SEV 2007). Hagtøl hjá SEV vísa somuleiðis, at samlaða elorkuframleiðslan var 269,3 MWh í 2007. Tølini vísa, at parturin av samlaðu elorkuframleiðsluni í landinum, ið verður framleiddur burturúr vindorku, er alt ov lágur. Vit mugu tí leggja okkum eftir í nógv størri mun enn nú at nýta umhvørvisvinarliga vindorku til elframleiðslu. Vindur og vindorka trýtur sum kunnugt ikki í Føroyum.

Í dag hevur SEV í alt 7 vindmyllur á (660 KWh x 6 og 150 KWh x 1) ella í alt 4.110 KWh.

Um Tórshavnar kommuna setir t.d. 5 vindmyllur av hóskandi støddupp (sambært upp-lýsingum hjá SEV er hóskandi støð á vindmyllum í Føroyum 1.000 KWh) kundu hesar vindmyllur helst framleitt meira enn tað dupulta av tí elorku, ið SEV fær burturúr vindorku í dag.

Upplýst verður, at íløgukostnaðurin fyri 5 vindmyllur vildi verið uml. í alt uml. 20 mió. kr. Slík vindmylluíløga kundi verið spjadd út yvir ávíst tíðarbil so sum t.d. 3 ár.

Tórshavnar kommuna kann óivað selja eina komandi el-vindorkuframleiðslu til SEV til somu treytir sum Sp/f. Røkt í Vestmanna. Soleiðis vildu borgararnir í Tórshavn og restin av landinum fingið gagn av reinari el-vindorkumegi frá høvuðsstaði landsins, Tórshavnar kommunu.

# Tvær kommunur, ella?

PETUR Í GONG



Ætlanin hevur leingi verið við lóg at leggja allar kommunurnar saman í færri og størri eindir. Nógv tøl hava verið nevnd, og siga vit sjey, so er tað helst eitt nøkulunda miðaltal.

Ætlanin er eisini, at hesar kommunur skulu vera javnbjóðis partar av samfelagnum. Tað má so merkja, at tær vera nøkulunda javnar í inntøkugrundarlag, og harvið íbúgvaratali. Men ber hetta til sum støðan er ídag?

Tórshavnar Kommuna telur ídag umleið 20.000,- íbúgvar, og svarar tað runt roknað til 40% av føroya fólki. Samstundis verður snakkað um eisini at leggja Vestmanna og Kvívík undir Tórshavnar Kommunu. Vit fara nú at nærkast 50% av føroya fólki.

Skulu vit so hava sjey javnbjóðis kommunur, mugu kvinnurnar uttanfyri Tórshavnar kommunu verða eitt sindur raskari at eiga børn, tí nú mangla eini 125.000,- føroyingar í. Og tað er bara uttanfyri Tórshavnar kommunu. Vit mugu eisini rokna við, at meðan hinar kommunurnar stríðast við at veksa, veksur Tórshavnar kommuna.

Hitt alternativið er, at landið verður skipað í einans tvær kommunur, men tá gevur tað sjálvandi onga meining at hava kommunur.

Kanska er einasta loysnin at hyggja nærri eftir støðdini á Tórshavnar kommunu. Skal hon nú vera so stór sum hon er? Er tað rætt at tráða eftir at leggja so nógv lendið undir seg sum gjørligt, ella eiga vit heldur at endurskoða okkara leiklut sum høvuðstaður?

Havnin er Havnin, mentunar- og vitanarmiðdepil. Og dygd hennara kemur best fram, um vit hava nakrar virkisførar gannakommunur at kappast og samstarvað við.

# Nýggjan Musikkskúla

HØGNI MIKKELSEN
býráðslimur
Valevni Sambandsfloksins til Tórshavnar Býráð



**Hvar bleiv skúlin av hjá sitandi samgongu**

Fyri skjótt 4 ár síðani hevði leiðsla og lærarar í Tórshavnar Musikkskúla fund við sitandi samgongu í Tórshavnar Býráð.

Evni var sjálvsagt at fáa bygt ein nýggjan musikkskúla, sum øll vita stórur tørvur er á. Musikklærarafelagið gjørdi eina skitsu sum borgarstjórin mælti teimum at gera, og skúlin skuldi liggja við Lútzenstrøð.

Fyri gott trimum árum síðani varð skitsuprojektið almannakunngjørt, og í tí sambandinum segði borgarstjórin, at spakin kundi setast í um trý ár, men sum øllum kunnugt er ongin spaki enn settur í nakað, sum hevur við musikkskúlan at gera. Enn einaferð orð og bert orð.

Byggi- og býarskipanarnevndin vildi ikki broyta byggisamtyktina, so at skúlin kundi byggjast á Lútzenstrøð. Tað minsta, sum kommunan kundi gjørt, var at víst á annað øki, har sum skúlin so kundi byggjast á, men tað er heldur ikki gjørt.

Tá fíggjarætlanin fyri 2007 bleiv gjørd, kom minnilutin í býráðnum við einum uppskoti, har mælt varð til at seta 23,6 mill. krónir í ein grunn, til at byggja ein musikkskúla, men tað uppskotið bleiv feiað av borðinum av sitandi samgongu. Síðani havi eg ikki hoyrt oðrið musikkskúla verða nevnt á býráðnum.

Tað er stórur áhugi hjá børnum at koma í musikkskúla - tað vísa tølini – tað eru yvir túsund børn sum ynskja undirvísing, men sitandi samgonga ger onki við trupuleikan.

Kemur verandi samgonga til ræðið aftur, kemur heldur ongin musikkskúli í komandi býráðssetu. Men um Tórshavnar Musikkskúli verður limur í Ítróttarsambandi Føroyar, so er møguleiki at skúlin verður bygdur við samgonguni sum nú situr.

Nú býráðsval er fyri framman, fari eg ikki at lova ein nýggjan musikkskúla, sum hevði verið tað besta, men eg fari at arbeiða fyri einum nýggjum Musikkskúla, og um tað ikki letur seg gera, mugu umstøðurnar verða munandi betri enn skúlin hevur í dag.

Tað verður nógv tosað um raðfestingar, og tað er gott, men musikkskúlin verður ikki raðfestur serliga høgt í býráðnum, men tað vil eg arbeiða fyri, um eg veri afturvaldur.

# Logisk porno

THORBJØRN BROCHS



Av tí at ein og hvør kann fara inn á alnótina og síggja porno, halda summi, at vit eins væl kunnu geva tað frítt at selja tað sama í øllum handlum, sum selja bløð. Vit kunnu eisini finna allan harðskap á alnótini. So er spurningurin, um eisini tað er ein grund til at selja harðskapsbløð? Hvat slag av logikki skulu vit nýta, tá ið vit gera av, hvussu løggávan skal vera? Eiga vit ikki at finna útav, um tað er gott at hava tílikt í samfelagnum, áðrenn vit geva tað frítt?

Eg vil gjarna gera vart við, at sjálvt lítil skúlabørn kunnu finna tað sama á alnótini, sum tey vaksnu kunna finna har. Er tað harvið sjálvsagt, at tílíkt eigur at vera atkomiligt í skúlanum?

Tá ið handilsfólk og tíðindafólk skulu lýsa ”veruleikan”, gangur altíð illa. Handilsfólkini vilja verja sín rætt at vinna pengar. Tíðindafólkini vilja verja sín rætt at skapa arbeiðspláss til sína egna stætt. Soleiðis eru treytirnar, um teir skulu yvirliva. Og politikarnir eru noyddir at vísa miðlavaldinum virðing, annars kunnu teir koma í ta støðu, at journalisturin spyr, um teir vilja avtaka pressufrælsið, soleiðis sum bankastjórin varð spurdur, tá ið hann helt fyri, at pressan ikki átti at borið misvísandi tíðindi.

Tí eiga øll at finna útav, hvat vit veruliga tosa um. Onkur sigur, at porno skal fylla ein tørv. Er tað møguliga so, at porno ger tann tørvin størri, sum maður frammanundan ikki fekk nøktað? Tað eru fólk til, sum vita meira um hetta enn allir handilsmenn, politikarar og pressufólk tilsamans vita, so hví ikki spyrja sálarfrøðingar, sum hava granskað hetta serliga evni? Sálarfrøðingar, ikki ”sexologar”, tí tað hevði verið sum at fara til ein fimleikalærari, tá ið tú átti at farið til lækna.

Eru færri neyðtøkur framdar í teimum londunum, har porno er frí søluvøra? Ella færri harðskapsmál? Hava fólk fingið sunnari fatanir um, hvussu vit kunnu liva saman? Er nakað godt komið burturúr? Helst er einasti fyrimunurin, at vit kunnu bjóða tí ”kristna fanatismuni” av, at vit kunnu fáa veruligt ”frælsi” frá forboðum. Men hetta er ein misskilјing. Kynslívið er ikki ókristiligt. Tað er ótrúskapur og tílíkt, kynsligt lógloysi, sum er ”ókristiligt”. Bert tað! Og hvat gott kunnu vit síggja í lygn og ótrúskap, sum eru onnur orð fyri sama fyribrigdi? Sig mær tað!!

Føroyingar eiga at herða løggávuna. Ein sjúklig mynd av, hvat kynslívið er, skapar altíð eina handilsvøru. Og tey handilsfólkini, sum opna slíkar ”fyritøkur”, hava ikki mjúkar hendur. Strip-tease er byrjanin til skøkjutrælkan, tann dagin oljupengar floyma inn yvir okkara neyðars land. Hvørt stað, har oljuvirksemið hevur dálkað gøtusteinarnar, líður undir avleiðingarnar av, at eingin løggáva er. Er løggávan ikki nóg greið, hevur løgreglan einki stýringsamboð. Um løgreglan ikki hevur heimildir at gera neyðuga arbeiðið, hvør skal so verja okkum?

Í staðin fyri at geva Mammon alla hondina, eiga vit at binda um heilan lítlafingur. Porno er eitt sár í lítlafingur.

Nú veit eg væl, at tað hjá teimum flestu er sera óvanligt at hugsa um at avmarka ”frælsið” hjá tí einstaka, enntá frælsið at skaða onnur. Palleba skal ikki vera lógartrælur, hann eigur at kunna velja sjálvur. Hevur tú umhugsað at hugsa teg um? Vit hava eina ferðslulóg, men framvegis henda vanlukkur. Hvat um vit onga lóg høvdu? Frælsi at skaða teg sjálvan ella onnur er eitt vánaligt frælsi.